

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 05 - 2013

# Menna oljuvinnu-samstarv við Bretland

Vit vænta eina týðandi menning í samstarvinum við Bretland innan eitt nú ferðavinnu, sniðgeving og ikki minst oljuvinnu, tey næstu árini, segði Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum í flaggdagsrøðuni hann helt í London nú um dagarnar. Johan vísti m.a. á, at føroyingar í fleiri ár hava fyrireikað seg til at finna olju. Oljuleiting við Føroyar er ein stór umhvørvislig avbjóðing, og ti mugu øll hugsandi atlit takast fyri at verja umhvørvið. Men menningin á hesum øki hevur borið tann rætta vegin. Nógv olja og gass er funnið á bretskum øki nær Føroyar, og vit hava orsøk til at vera bjartskygd. Oljuleiting og vinna kann gerast ein grundarsteinur undir føroyska búskapinum í næstu framtíð. Vit hava longu tætt samstarv við Bretland og kann oljuvinnan gerast ein týðandi partur av hesum samstarvi í framtíðini, helt Johan Dahl fyri. Millum teir 150 gestirnar vóru krígsveteranurin, Harry Wilson, bretsk tingfólk, umboð úr diplomatiska umhvørvinum og vinnulívinum, ið høvdu leitað sær inn á sendistovuna til flaggdagshaldið í London í ár. Tiltakið, sum sendistovan skipar fyri, er vorðið ein fastur táttur fyri føroyavinir og føroyingar eitt høvi at fagnast um sambandið landanna millum.